Nýggi strandferðslustjórin:

# Fokus á tænastuna

**Hóast hann situr í góðum starvi uttanlands hevur Kristian Davidsen valt at taka við nýggju avbjóðingini sum stjóri fyri Strandferðsluna. Eitt av aðalmálunum verður at halda eitt høgt tænastustøði**

SAMRØÐA
*Heri á Rógvi*

Fyrr í vikuni gjørdist tað greitt, at Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, hevur sett nýggjan stjóra fyri Strandferðsluna fyri Reidar Nónfjall, ið hevur sagt seg úr starvi.

Talan er um 36 ára gamla Kristian Davidsen. Hann er úr Havn og er sonur Hjalgrím og Hedvig Davidsen. Hann er giftur við Hildur, sum er ættað av Toftum. Saman eiga tey sjey ára gamla sonin Hjalgrím.

Nýggi strandferðslustjórin er útbúgving sivilverkfrøðingur í Keypmannahavn. Hansara sergrein er innanfyri telesamskifti. Afturat verkfrøðingaútbúgvingini hevur Kristian eisini tikið HD í organisatión (skipanarfrøði).

Seinastu sjey árini hevur hann starvast hjá Ericsson sum leiðari fyri eina deild, ið fæst við kundatænastu í Skandinavia og Baltisku londunum.

Áðrenn hann byrjaði at starvast hjá Ericsson, arbeiddi hann í Føroyum hjá Føroya Tele, og hann undirvísti eisini eitt skifti á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum.

### Vildu aftur til Føroya

Seinasta hálvtannað árið hevur Kristina og familjam tosað nógv um at flyta aftur til Føroya at búgva.

– Vit hava okkara røtur í Føroyum, og vit hava bæði tvey hug at venda aftur til Føroya. Sonur okkara er júst byrjaði í skúlanum, og hetta ger, at vit standa við eitt vegamót, sigur Kristian Davidsen.

Tá so starvið sum stjóri fyri Strandferðsluna gjørdist leyst at søkja, so varð avgerðin tikin um at venda aftur til Føroya.

– Eg hugsaði meg nógv um, áðrenn eg søkti. Tá eg so hevði sent umsóknina avstað, so var endaliga avgerðin tikin, sigur Kristian Davidsen.

Bæði hann og familjan gleða seg til at venda aftur til Føroya. Tey eiga hús í Havn, soleiðis at tey sleppa undan bústaðarleitan á trupla marknaðinum í høvuðsstaðnum.

Kristian skal byrja í starvinum 1. januar 2003, og tey flyta í næstum.

### Einki afturstig

Nýggi strandferðslustjórin ger greitt, at hann ætlar at nýta alla orku til sítt nýggja starv. Hann fer í framtíðini einki samband av hava við Ericsson ella luttaka í øðrum nevndararbeiði fyrstu tíðina.



*Kristian Davidsen byrjar í starvinum sum stjóri fyri Strandferðsluna 1. januar. Hann fer úr einum leiðarastarvi hjá altjóða fyritøkuni Ericsson, men sær ikki nýggja starvið sum nakað afturstig – heldur ein spennandi avbjóðing.*

*Mynd: Bárður Eklund Johansen*

– Eg meti hetta starvið sum eina ógvuliga stóra avbjóðing. Í veruleikanum liggur hetta starvið ikki so langt frá tí, eg havi gjørt hjá Ericsson, sigur Kristian Davidsen.

Við sínum hollu royndum innan leiðslu, ætlar hann sær at stýra einum tí mest umrødda partinum av almenna kervinum.

– Tú mást góðtaka tað rokaliga við starvinum. Vit skulu fyrst og fremst liva innanfyri fíggjarligu og politisku karmarnar, og tað verður so mín uppgáva at royna at fáa viðvind á leiðini, sigur Kristian Davidsen.

Enn hevur Kristian Davidsen ongar fráboðanir um, hvørjar ítøkiliga broytingar, hann ætlar at seta í verk, men nøkur mál hevur hann sett sær.

– Vit fara í leiðslubólkinum at fokusera uppá tænastustøði. Vit fara at miðja eftir einum so góðum tænastustøði sum gjørligt. Afturat hesum verður stremba eftir at gerast effektiv og skapa trivnað fyri starvsfólki, sigur Kristian Davidsen.

Hann er vorðin væl kunnaður um strukturin á Strandferðsluni, og í nógvar mátar heldur hann, at Strandferðslan minnir um fyritøkur á privata arbeiðsmarknaðinum.

– Hyggur mann eftir strukturinum, so minnir hann nógv um privatar fyritøkur. Munurin er tó tann, at vit hava nakrar skyldur at røkja, og privatar fyritøkur skulu bara hugsa kommersielt, sigur Kristian Davidsen.

Tað kann eisini tykist eitt stig tann skeiva vegin at fara frá einum góðum starvi í einari stórari altjóða fyritøku til at gerast stjóri á Strandferðsluni.

– Eg vil so avgjørt ikki siga, at hetta er nakað afturstig fyri meg. Eg eri errin av at kunna taka hesa avbjóðingina uppá meg, sigur Kristian Davidsen.

Vit ynskja nýggja stjóranum til lukku við starvinum.






# Ginu Søgur út at ferðast



*Alt landið sleppur nú at hoyra meira um Ginu søgurnar, tá leikararnir leggja leiðina framvið spælistøðum kring landið*

**Nú verður farið at ferðast við leikinum. Ginu Søgurnar eru nú givnar fyri fyrst á Meiarínum, men koma tær aftur higar seinri. Nú verður farið út ferðast við leikinum, og verður spælt í Losjuni Gøtu hósdagin**

Tíðindaskriv

Síðani premieruna 5. oktober, hava Ginu Søgur spælt fyri fullsettum húsum í Havn, og hava um 2.250 fólk sæð leikin á Meiarínum. Nú var neyðugt at taka leikin av pallinum har, tí at longu leygardagin hevur nýggi leikurin hjá Grímu »LIST« premieru.

Nú fáa so tey uttanfyri Havnina høvi at síggja Ginu Søgur, hetta leikverk sum hevur fingið so nógva umrøðu bæði í bløðum og í talu. Leikin Ginu Søgur hjá Eve Ensler, hevur Ria Tórgarð týtt og leikstjórna, leikarar eru tær tríggjar Birita Mohr, Kristina Hansen og Gunnvá Zachariasen.

Hósdagin 31. oktober kl. 19.30 verður leikurin framførdir í Losjuni í Gøtu, og sunnudagin 3. november kl. 16.00 í Mentunarhúsinum í Fuglafirði, hendan sýningin er longu útseld og verður tí ein eykasýning sama kvøld kl. 19.30, so ikki kan sigast annað enn at tað er ein góð byrjan.

Seinri verður so farið til Strendur, Runavík, Vestmanna, Suðuroy, Sandoy, og Vágoy.

Atgongumerkir til sýningina í Gøtu fáast við dyrnar 1 tíma undan sýningini og á telf. 441737 frá kl. 13.00 hósdagin, meðan Kunningarstovunar í Runavík og Fuglafirði selja atgongumerkir til sýningarnar í Mentunarhúsinum í Fuglafirði.

Einar Waag:

# Broyta ikki lýsingarpolitikk

**Stjórin fyri Føroya Bjór heldur tað vera í lagi, at fútin nú roynir mál um rúsdrekkalýsingar í Føroya rætti. Føroya Bjór hevur tó ongar ætlanir um broyta politikk á økinum**

RÚSDREKKA
*Heri á Rógvi*



*Einar Waag, stjóri fyri Føroya Bjór, sigur, at teir halda fram sum eg við teirra lýsingarpolitikki.*

Stjórin fyri Føroya Bjór, Einar Waag, hevur fingið fráboðan sendandi frá Føroya landfúta, at ákærurit er sent Føroya rætti viðvíkjandi trimum lýsingum hjá fyritøkuni, sum hava staðið í Dimmalætting.

Í lýsingunum verða greitt frá nøkrum uppskriftum. Sum partur av rávørini til rættirnar er øl frá Føroya Bjór. Navn og mynd av sterkum øli hjá Føroya Bjór er í lýsingini.

Einar Waag greiðir frá, at teir hava fingið eitt bræv sendandi, har tað verður gjørt greitt, at fútin hevur skrivað ákærurit, men ongin fráboðan er komin frá Føroya rætti um at møta. Málið verður í brævinum til Føroya Bjór sett í samband við ákærurnar móti Club 20 og Restorffs bryggjaríi, sum jú hava verið fyri rættinum í síðstu viku. Málið viðvíkjandi Føroya Bjór er tó enn ikki sett á rættarlistan.

Ì fráboðanini til Føroya Bjór frá fútanum verður boðað frá, at tað er stjórin í Restorffs bryggjarrii, sum hevur beint fútan á Føroya Bjór. Hetta hendi, tá hesin sendi ein fyrispurning til fútan um áðurnevndu lýsingar.

Óli Svenn vísir tó staðiliga aftur, at hann skal hava meldað Føroya Bjór til fútan.

### Halda fram

Einar Waag heldur tað vera í lagi, at fútin nú hevur valt at hyggja nærri at rúsdrekkalýsingum.

– Eru tað nøkur, sum ikki halda lógina, so mugu hesi eisini fáa tað at vita. So leingi vit hava hesa rúsdrekkalógina, so mugu vit eisini arbeiða útfrá henni, sigur Einar Waag.

Hann sigur, at teir ongar ætlanir hava um at hálsa um á lýsingarøkinum.

– Vit hava altíð verið sera varnir, og tað vera vit framvegis, sigur Einar Waag.

Tá hann ikki veit meira um málið, so vil hann heldur ikki siga nakað um. hvørt hann roknar við at verða dømdur fyri lýsingarnar í Dimmalætting.

À rættarfundinum í málinum viðvíkjandi lýsingunum hjá Restoffs vóru fleiri lýsingar hjá Føroya Bjór uppi at venda fleiri ferðir.

Tað snúði seg serliga um lýsingarnar við »P-degi« og »J-degi«. Eisini varð víst til eina lýsing á Álmunakkanum, har lýst varð við sterkum øli.

Einar Waag sigur, at við lýsingunum í sambandi við »P-dag« og »J-dag« hava teir ikki fingið forboð ímóti at lýsa, Lýsingarnar hava verið at sæð seinastu fýra árini.

Lýsingina í Álmunakkanum hava teir ikki longur við sterkum øli, men heldur er talan um sodavatn nú. Fútin hevði givið teimum loyvi til at lýsa við sterkum øli, men tað var útgevarin av sínum eintingum, ið tók lýsingina burtur.

# Vilja gerast sjálvstøðugur limur



*Høgni Hoydal og hini føroysku umboðini á Norðurlandaráðnum*

**Føroyskir luttakarar á norðurlandsráðsfundinum í Helsinki krevja, at Føroyar gerast sjálvstøðugur limur í ráðnum**

LIMASKAPUR
*Heri á Rógvi*

Í hesum døgum eru føroyski politikarar á norðurlandaráðsfundi í Helsinki. Umframt tað vanliga á slíkum fundum hava føroysku luttakararnir ein serligan boðskap við sær í ár.

Teir ynskja nevniliga, at Føroyar skulu gerast sjálvstøðugur limur í Norðurlandaráðnum.

Í tíðindaskrivi verður greitt frá, at Jóannes Eidesgaard, Jógvan á Lakjuni, Høgni Hoydal og Páll á Reynatúgvu.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í Norðurlandamálum, skrivar í tíðindaskrivi, at nú eru 50 ár liðin síðani Norðurlandaráðið varð stovnað, og stundin er komin til, at Føroyar, Grønland og Áland gerast fullir limir og gjalda sjálvi. Anfinn Kallsberg hevur eisini á fundi við forsætisráðharrarnar greitt frá føroyska ynskinum. Málið verður sent út til ráðharrarnar í Norðurlandamálum, og ætlanin er at viðgera hugskotið aftur í desember. Høgni Hoydal nevnir eisini í tíðindaskrivi, at krav um samstarv við grannaøkini í Útnorði, t.e. Hetland, Hebridurnar, Orkneyoyggjar, Skotland, Írland og kanadisku økini, eisini sett fram